# Hava jólahugna í Atlantis



*Komandi dagarnar varð jól í Atlantis. Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur jólaundirhald til børnini, og nógv verður gjørt burturúr*

**Komandi dagarnar hevur Klaksvíkar Sjónleikarfelag jólahugna fyri børn í mentanarhúsinum Atlantis**

JÓL

*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Í dag fara fólk í Klaksvíkar Sjónleikarfelag undir eitt nýtt tiltak. Talan er um Jól í Atlantis, sum tey rópa tað.

Tað hevur ikki verið vanligt, at Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur havt jólaundirhald til børnini, men nú ætla tey, at tað skal gerast afturvendandi táttur. Fyri umleið 15 árum síðani var líknandi tiltak, men tað var ikki endurtikið – fyrr enn nú.

Tað er alskyns undirhald á skránni í Atlantis komandi dagarnar. Tað verða smáir leikir, søgur, og nógvur sangur á skránni, og ætlanin er, at børnini, sum koma til undirhald, skulu sleppa uppí part at syngja.

Jól í Atlantis verður hósdagin, fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin, og tað verður spælt tvær ferðir um dagin. Fleiri sýningar verða ikki.

### Børn og vaksin fyrireikað

Seinastu vikurnar hevur Klaksvíkar Sjónleikarfelag spælt skemtileikin Mostir Charley, sum hevur verið væl dámdur, men hóast leikararnir í hesum leiki hava havt úr at gera seinastu tríggjar mánaðirnar, so hevur tað eydnast at gjørt jólaundirhald fyri tað.

Orsøkin er, at tað eru aðrir leikarar og onnur fólk, sum hava tikið sær av jólaundirhaldinum, og hesi fólk taka yvir, nú Mostir Charley er liðugt spældur í fyrstu syftu.

Eisini hava børn úr dagstovnunum í Klaksvík verið við, og tey hava gjørt pynt, sum skal prýða um Atlantis. Verkfall órógvaði hetta arbeiðið, men tað, sum var gjørt áðrenn verkfalli, er komið upp at hanga í Atlantis.

Skúlabørn úr Klaksvík og av Viðareiði eru eisini við í jólaundirhaldinum.

## VIÐMERKINGAR

# Tað eru menn

**Jónas Johnsson**



Hesir menn hava áhaldandi ført fram, at býráðið einans ætlar at gera ein sáttmála fyri hvørt arbeiðsøki sær. Eisini at allir borgararnir í Tórshavnar kommunu skulu viðfarast líka. Øll hesi góðu orð eru góð og rímulig orð fyri rættar menn. Men hvat skilagott hevur kommunan so gjørt í verki til tess at liva upp til tey viðvíkjandi dagrøktarunum í Havn og í Kollafirði? Einki! Tað er heldur øvugt! Eingin reel millumgonga hevur verið. Tvørtur ímóti er hoyrt, at tær (dagrøktarmammurnar) í Havn ikki skuldu so mikið sum váða sær at tosa við dagrøktararnar í Kollafirði. Hvat er nú hetta? Rættir menn? Góðan morgun. Atkvøtt varð um samanlegging – ikki um voldtøku og kúgan.

Júst nú fara tingingar fram við Starvsmannafelagið, har 80% av dagrøktarunum í Tórshavnar kommunu eru limir. Í Starvsmannafelagsins sáttmála fylla tær higartil, sum skilst, bert eina parantes. Men 20% av dagrøktarunum eru nýkomnir borgarar í Tórshavnar kommunu. Tær arbeiða í norðasta partinum av kommununi, Kollafirði, og høvdu sáttmála innan ársskiftið 00/01. Men teirra felag situr ikki við borðið. Tískil er týðuligt, at býráðið ætlar at gera ein sáttmála uttan um kollfirðingarnar. Tað er tí í roynd og veru blivið til, at teir júst ikki vilja viðfara øll líka. Tær hava eisini øðrvísi geografiskar fyritreytir, sáttmála- og arbeiðskor at vísa á, umframt at dagstovnar ikki eru í Kollafirði, so sum í Havnini.

Tað er eisini skammiligt av Starvsmannafelagnum, at tað ikki ger royndir at ganga Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag á møti við samstarvi. Tá varð tann eymi knúturin kanska loystur, t.d. við at loysa hetta økið frá meginsáttmálanum? Tað skuldi verið møguligt – um viljin var. Aftan á kundu so bæði feløgini hvør í sínum lagi undirskriva tann sama sáttmálan, sum tey í semju høvdu tingast við býráðið um. Eitt úrslit við einum og sama innihaldinum, sum tó hevði fyrilit og hóskandi sundurliðing, ið kundi gjørt hann skikkaðan til ymiska tørvin í kommununi og til bæði feløgini (ella fleiri).


AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil
- ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK



AUTO
311234



fríggjakvøldið 07/12 Jens Marni BAND
DJ Ottar í Funningsstovu
leygarkvøldið 08/12 Jens Marni BAND
DJ Ottar í Funningsstovu
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque
petur & petur • 320870






# Í Býin


**Fríggjakvøldið**
Happy Hour
23.00-24.00
Diskotek við
Kristian Joensen
BAROK

**Leygarkvøldið**
Happy Hour
23.00-24.00
Diskotek við
Allan Poulsen
Shanghai
Bíleggið borð á
telefon 223000 ella
457680

fk Matseðilin
Hósdagin 6. des.:
**Hamburgarryggur**
Fríggjadagin 7. des.:
**Grýturættur**
Leygardagin 8. des.:
**Rivjasteik**
Mánadagin 10. des.:
**Milliónbúffur**
Týsdagin 11. des.:
**Livur**
Mikudagin 12. des.:
**Eftirgjørd dunna**
***
**Seinnaparts-TILBOÐ**
frá kl. 14.00:
**Juniorburgari 19,95**
**Maxiburgari** *ella*
**Búffsandwich 25,00**
Matstovan
í Hoyvík

Café Natúr
Doc spælir á Caféini
til 9. desember
Frá 12. desember - 16. desember
spælir *Neil Brophy*
Gløgg og holukøkur
*kr. 40,-*
*livandi tónleikur*
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25
Sosialurin 311820



HESA VIKUNA
Hóskvøldið
DJ Magnus Zachariasen
Fríggjakvøldið
ladies night
DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið
DJ Magnus Zachariasen
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur
v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,–
Discoteque
Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 7. desember
• "Fimmari" - opið frá kl. 17.00
• Dansur frá kl 24.00 - 04.00
"**Sølva og Bergmenn**" spæla
UNDIRHALD
**Leygardagin 8. desember**
• Sjavskapping opið frá kl. 19.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
"**Sølva og Bergmenn**" spæla

Casablanca
Ristorante
**Hugnalig nýggj**
**Italiensk matstova**
Vel millum 30 fjølbroyttar:
***Forverðar, suppur,***
***pasta, pizza,***
***fiskaverðar, kjøtverðar,***
***barnamenu og dessertir***
Opið er
*Mánadag - hósdag*
*1700-2230*
*Fríggjadag & leygardag*
*1700-2400*
*Sunnudag*
*1230-1500*
*1700-2230*
**Borðbílegging á tlf 31 96 96**
Casablanca

Í Býin
-hvønn hósdag

Hafnia
Lounge
*Frá nú av fram til jóla*
*hava vit m.a.*
*Gløgg kr. 30,-*
*Eplaskivur kr. 15,-*
*Stór vafla við róma*
*og súltutoy kr. 15,-*
*Kaffi við dagsins*
*køku kr. 38,-*
*Størri úrval á menukorti*
*Opið frá kl. 14.00*
HOTEL HAFNIA
*Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50*

**NÁTT-**
**BUSSURIN**
**hjá Øssuri Christiansen**
**Leygarkvøldið :**
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík
og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann
koyrast eftir avtalu



**Tlf. 424254**
**Bussarnir:**
**Tlf. 286254**

Felagið
Tórshøll
Hetta
vikuskiftið
spæla
Flúrar
Hvørt fríggjakvøld,
leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Leygarkvøldið verður
jólabingo kl. 20.00
At vinna verður m.a.
dunnur, karamellur og
ræstkjøt
Sunnudagin verður
sjavskapping kl. 15.00
Vinningar verða
dunnur, karamellur og
ræstkjøt
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

BýIN